## Tit ringja — vit skriva

Er nakað á vási? — Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara
Vit eru til reiðar!
**Telefon 118 20 - Telefax 147 20**

tíðindablaðið **sosialurin**

## Lýsingar

Lýsingarfólk okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingarspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran
**Telefon 118 20 - Telefax 147 20**


# veðrið

**Eitt lágtrýst yvir Atlantshavinum ferðast í landnyrðing sunnanfyri Ísland og víðari móti Norðurnoregi. Tilhoyrandi brúgvalog fara yvir Føroyum leygardagin og kølin luft við ælingi rekur móti Føroyum av útsynningi og vestri.**

### Leygardagin



**At byrja við friskt lot upp í struk, 10-13 m/s, av suðri, adrigið, vanalít ella bert tóluligt sýni og regn í skiftum. Út á seinnapartin gul ella friskt lot upp í struk, 8-12 m/s, av útsynningi, betri sýni og bert hendinga æl. Hitin um dagin millum 10 og 13 stig, um náttina millum 7 og 10 stig.**

### Sunnudagin og mánadagin

**Gul ella friskt lot upp í struk, 8-13 m/s, av útsynningi og vestri, lutvíst adrigið, skiftandi sýni, regnælingur, men eisini hendinga sólarglottar. Hitin um dagin millum 10 og 13 stig, um náttina millum 7 og 10 stig.**

### Týsdagin og mikudagin

**minni vindur av vestri til lítið lot upp í gul, 3-8 m/s, lutvíst adrigið, men gott sýni, sólarglottar og bert hendinga æl. Hitin um dagin upp í 13 stig, um náttina millum 7 og 10 stig.**

# óli teknar

## *Kreppudreymar*




*–Seinasta oljan?*

# Øll í lagi

Tað eru undantøkini, sum koyra bil við ongum koyriloyvi.

Hetta vísir ein kanning, sum ferðslupolitiið gjørdi týsdagin á Hvítanesvegnum í Havn.

Politiið steðgaði 114 bilum. Av teimum høvdu fýra ikki koyrikortið uppiá sær, men høvdu annars koyrikort. Bara hjá einum var koyrikortið útgingið.

Ferðslupolitiið gjørdi hesa kanning, tí tað er hent fleiri ferðir, tá bilar eru steðgaðir í øðrum sambandi, at bilførarin ikki hevur havt nakað koyriloyvi, t.d. er frádømdur koyrikortið. Eitt nú voldi hetta politinum í Eysturoynni stórt høvuðsbrýggj. Men sum sagt vísti henda kanningin, at tað eru undantøkini, sum koyra, sjálvt um tey iki hava loyvi at koyra.

**randi**

# Ikki lukkuligt

Børn hava ríkt fantasi, men tað tey siga, kann vera veruligt.

Sunnukvøldið seint komu tvær smágentur á Eiði forfardar til hús. Tær høvdu sæð nakað ræðuligt.

Genturnar høvdu sitið í bønum vestanfyri hotellið. Har høvdu tær sæð eina gamla konu sita og fortelja eini smágentu søgu. Knappliga hevði henda gamla reist seg við einum stórum knívi í hondini og skorið smágentuna í pannuna, og hon bløddi illa. Smágentan hevði rópt, men tann gamla hevði skrykt í hana og drigið hana aftaná sær.

Soleiðis fortaldu eiðisgenturnar heima. Tær høvdu ikki fingið við, um konan tosaði føroyskt ella annað mál.

Heima fingu tey seg illa at trúgva gentunum, men tær hildu fast við frágreiðingina, og tær vóru so illa við, at hvørgin fekst í song.

Tey vaksnu vistu ikki rættiliga, hvat tey skuldu gera. Tey hildu seg illa kunna leggjast á boðini, um genturnar tosaðu satt, og tí fóru tríggir mans niðan at hyggja. Aðra gentuna fingu tær við sær.

Men teir funnu einki. Politiið fekk boð um, hvat genturnar høvdu sagt, og teir fóru eisini at hyggja, men einki sást hvørki til knív, blóð, gentu ella gamla konu. Eingin er saknað, og einki er frætt um nakrar skaða.

Meira verður ikki gjørt við hesa søguna.

**randi**


**Storno**
*–tín trygd fyri góðsku!*

N M T 4 8 0



**H. J. Michelsen**
Handan á 6. Tórshavn
tlf. 1.4414 – fax 1.8045


# Vestfalskyrrindi

22. juli: Seinna kvarter
29. juli: Tendring
30. juli: Mánin næstur jørðini

| | Suðuroyar-/ Vagafirði | | Vestmannasundi | | Nólsoyarfirði | | Haraldssundi/ Lorvíksfirði | | Skúvoyarfirði/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 25. juli | 0310 | 1535 | 0510 | 1735 | 0125 | 1350 | 0325 | 1550 | 0210 | 1435 | 0225 | 1450 |
| 26. juli | 0401 | 1628 | 0601 | 1828 | 0216 | 1443 | 0416 | 1643 | 0301 | 1528 | 0316 | 1543 |
| 27. juli | 0456 | 1724 | 0656 | 1924 | 0311 | 1539 | 0511 | 1739 | 0356 | 1624 | 0411 | 1639 |
| 28. juli | 0552 | 1821 | 0752 | 2021 | 0407 | 1636 | 0607 | 1836 | 0452 | 1721 | 0507 | 1736 |